Grundgeving fyri Ársins Virki 2016

Føroyar eru eitt samfelag, sum er umgyrt av vatni. Bæði tí vit liggja mitt í Norðuratlantishavi, og ikki minst tí vit stóran part av tíðini verða undiroyst í regni úr erva. Bora vit niður í undirgrundina, so spríkir mín sann eisini vatn uppeftir, og í summum førum enntá heitt vatn. So vatn og veskur eru frá náttúrunnar hond ein stórur partur av okkara tilverugrundarlagi. Og vit royna sum frægast at gagnnýta teir møguleikar, tað gevur. Fiskiskip, farmaskip og havbúnaðurin brúka havið til at skapa stór virði fyri føroyska samfelagið hvønn einasta dag. Regnvatn úr fjøllunum savnast í áum og verður haðani leitt gjøgnum slangur og tappað niður í fløskur, sum verða seldar her heima og uttanlands. Á orkuøkinum hava vit megnað at tamt ein part av vatnorkuni við at leiða vatnið gjøgnum rør oman til turbinustøðir, og harvið framleiða streym til føroysk húsarhald og vinnulív. Jú, nógvir møguleikar eru í vatni og veskum.

Eisini á øðrum økjum hava vatn og veskur ein týðandi leiklut í vinnuvirkseminum, hóast vit vanliga ikki geva okkum far um tað. Heilt afturí 6. øld fyri Krist nýttu bøndur í Mesopotamia og Egyptalandi hesa tøknitil at leiða vatn úr áum til tess at væta markirnar, sum lógu longri burturi. Tøknin er síðani ment, og hevur breitt seg út um allan heimin. Hon verður í dag brúkt í nógvari ymiskari aðrari tøkni, eisini her í Føroyum.

Tá vit síggja ein trukk á keiini, geva vit okkum vanliga ikki far um, at tað er sama tøkni, sum eru orsøk til, at trukkurin klárar at lyfta tunga fiskakassan. Og tá vit síggja eitt skip, eina tvíkilju ella ein bát venda inn í havnina, geva vit okkum vanliga ikki far um, at tað aftur er henda tøknin, sum ger, at ein skipari kann standa á brúnni ella í stýrihúsinum og fáa róðrið at venda við miklari kraft.

Dómsnevndin hevur í grundgevingini fyri at velja júst hesa fyritøkuna til Ársins Virki lagt dent á, at fyritøkan hevur verið framfýsin og víst ein vilja til vøkstur bæði heima í Føroyum og uttanfyri landoddarnar. Dómsnevndin hevur eisini lagt dent á, at fyritøkan seinastu árini hevur haft støðug fíggjarlig úrslit, og at tey sum heild eru vorðin betri ár fyri ár. Eginpenings- og ognaravkast eru millum tey frægastu í landinum. Fyritøkan leggur stóran dent á støðuga og góða góðsku, og hevur til hetta endamál sett í verk góðskustýringarskipanir.

Ársins Virki 2016 varð sett á stovn í 1978. Fyritøkan er grundað á serkunnleika innan hydraulik og maskintøkni og veitir útgerð saman við tænastum til fiskiídnaðin, alivinnuna, umframt flutningsvinnuna og byggivinnuna. Fyritøkan framleiðir m.a. aliringar og tvíkiljur, ið verða seldar til kundar í Føroyum og uttanlands. Eisini selur fyritøkan eina røð av maskinum og eykalutum, og veitir tænastur til hesi. Umleið ein triðingur av inntøkunum stavar frá alivinnuni, ein triðingur frá fiskivinnuni og ein triðingur frá tí almenna og entreprenørum.

Sum ein av størru fyritøkunum á maskintekniska økinum í Føroyum, veitir Ársins Virki eisini útgerð og tænastur til útlendskar marknaðir, eitt nú til Íslands, Skotlands, Hetlands, Grønlands, Danmarkar og til Noregs.

Fyritøkan hevur víðkað um sítt virkisøki, og deildir eru settar á stovn í Tórshavn og Danmark. Í løtuni starvast uml. 100 starvsfólk í fyritøkuni, nógv tey flestu í Føroyum. Talið á starvsfólki er støðugt økt seinastu árini.

Á Vinnudegnum í fjør segði ein av fyrilestrarhaldarum: “Gloym Silicon Valley, hugsa Kambsdal!”. Tey orðini hevur dómsnevndin tikið til sín og valt eina fyritøku við høvuðssetri í júst tí vinnuliga kraftsentrinum á Kambsdali.

Hóast tey flestu helst longu hava gitt, hvørja fyritøku talan er um, skal tað tó sigast hart. Ofta verður sagt, at hevur man sagt A, má man eisini siga B. Í hesum føri kann man í staðin fara eitt sindur longri fram í alfabetið: hevur man sagt K, má man eisini siga J.

Ársins Virki 2016 er KJ Hydraulik, og vilja vit fegin bjóða Ólavi Asafssyni Olsen, stjóra í KJ, niður at taka ímóti heiðrinum.